# 18 skutu í Vágum

**Nýggja bogaskjótifelagið í Vágum skipaði sunnudagin fyri kappin**

BOGASKJÓTING
*tíðindaskriv*

Kappingin varð hildin í Ítróttarhøllini á Giljanesi, og var talan um dystarskjóting á 18 metrum.

10 recurve- og 8 compound skjúttar tóku lut í kappingini, og av hesum komu seks úr heimaliðnum.

## Recurve

Innleiðandi vóru tveir bólkar við fimm skjúttum í hvørjum. Í bólki A vann Annika Vang, Ørvur, allar sínar dystir og nummar tvey var Jákup G. Joensen úr Vágum, sum vann tríggjar dystir. Í bólki B vann Kristian Niclasen, Tambar, allar sínar dystir og nummar tvey var Rakul Dam, Tambar, sum vann tríggjar dystir.

Við úrslitunum frá hesum umfarinum varð bólkað av nýggjum í miðumfarinum. Úrslitini vóru nærum tey somu. Annika og Kristian vunnu allar sínar dystir, Rakul tapti ein dyst. Øssur Hansen, formaðurin í felagnum í Vágum, hevði nú tikið seg fram og tapti hann bert ein dyst í miðumfarinum.

Í hálvfinaluni skuldu skjótast í mesta lagi fimm sett. Tann, sum fyrst vann trý sett á tríggjar pílar, vann dystin.

Í fyrru hálvfinalu møttust Annika og Øssur. Øssur legði seg á odda við at vinna tvey tey fyrstu settini, men kom Annika fyri seg aftur og vann tey næstu trý settini. Dysturin endaði við 3-2 sigri til Anniku.

Seinna hálvfinalan var ímillum Kristian og Rakul. Rakul vann fyrstu tvey settini og javnaði Kristian til 2-2. Seinasta settið endaði javnt og var neyðugt við umskjóting. Í slíkari umskjóting verður ein pílur skotin og vann Rakul 9-8 og sostatt eisini dystin 3-2.

Kristian og Øssur dystaðust síðan um 3. plássið. Nú var talan um at vera best av sjey settum. Øssur vann fyrsta settið, síðan gjørdi Kristian bart og vann greitt næstu fýra settini og dystin við 4-1.

Í finaluni møttust Annika og Rakul. Tær vístu báðar sera góða skjóting. Dysturin endaði við 4-1 sigri til Anniku.

## Compound

Innleiðandi í bólki A vóru dystirnir javnir. Jógvan Niclasen, Tambar, vann bólkin við fýra stigum – einum vunnum og tveimum jøvnum dystum. Síðan høvdu Albert Dam, Ørvur, og Jóannes Poulsen, Ørvur, trý stig hvør og Kristoffer Andreasen tvey stig. Albert hevði skotið flestu stigini og bleiv tí nummar tvey í bólkinum.

Í bólki B vann Per Holm Andersen, Ørvur, allar sínar dystir og nummar tvey var Sigrid Vang, Ørvur, sum bert tapti ein dyst.

Í millum umfarinum í bólki A vóru tað Jógvan og Sigrid, sum komu víðari við ávikavist seks og fýra stigum.

Í bólki B vann Per allar sínar dystir, ímeðan hinir tríggir vóru javnir. Albert hevði aftur hesaferð flest skotin stig og fór víðari til hálvfinaluna.

Yngsti skjútti í kappingini, Kristoffer Andreasen, skeyt sera væl og setti persónligt met við samanlagt 543 stigum, bert sjey stig frá kravinum til innandura HM-kappingina í mars mánaði.

Fyrra hálvfinalan var ímillum Jógvan og Albert. Her gekk javnt á. Í fyrsta setti máttu tveir eyka pílar til at finna vinnaran. Jógvan vann dystin 3-2.

Seinna hálvfinalan var ímillum Per og Sigrid. Per vann 3-1, men máttu trý tey fyrstu settini gerast av við eyka pílum.

Albert og Sigrid møttust síðan um triðja plássið. Albert vann dystin 4-0 í sera jøvnum settum.

Finalan var ímillum Jógvan og Per. Eisini hesin dysturin var sera javnur og spennandi, men var bert umskjóting í einum setti. Jógvan vann 4-3 og er hetta eisini fyrsta kappingin, sum Jógvan hevur vunnið.

# Aftur 18



Nicoleta Radu Hansen hevur higartil í ár verið besti málskjúttin í kvinnudeildini í hondbólti, og mikukvøldið gjørdi so aftur eitt gott hál.

Eftir at hon fyrr í ár varð fyrsta kvinnnan seinastu fimm árini, sum hevur skotið 17 mál í einum dysti, varð hon skjótt yvirhálað av Ioanu Rápa, men nú svaraði Nicoleta so aftur. 18 mál móti Kyndli førdu eisini fyribils við sær, at hon legði nakað av fjarstøðu til Ioanu á máltindinum.

Listin yvir leikarar, sum hava skotið flest mál í einum og sama dysti síðani kappingarárið 1999/00, sær annars soleiðis út:

| Ár | Leikari | Lið | Dystur |
|---|---|---|---|
| **18 mál** | | | |
| 2004/05 | Ioana Rápa | VÍF | Kyndil-VÍF |
| 2004/05 | Nicoleta Radu Hansen | Søljan | Kyndil-Søljan |
| **17 mál** | | | |
| 2004/05 | Nicoleta Radu Hansen | Søljan | Tjaldur-Søljan |
| 2002/03 | Áki Mørk | Neistin | KÍF-Neistin |
| 1999/00 | Áki Olsen | Neistin | Neistin-Tjaldur |
| **16 mál** | | | |
| 2003/04 | Simona Petersen | Neistin | Neistin-VÍF |
| 2001/02 | Gabrielle Fekete | VB | StÍF-VB |
| 2001/02 | Simona Petersen | Søljan | Søljan-Stjørnan |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | Neistin-H71 |
| **15 mál** | | | |
| 2002/03 | Áki Olsen | VÍF | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Bjarni Wardum | H71 | StÍF-H71 |
| 2001/02 | Heini Hanusarson | Neistin | VÍF-Neistin |
| 2001/02 | Asta Petrauskiene | Søljan | Søljan-Kyndil |
| 2001/02 | Ioana Rápa | VÍF | Søljan-VÍF |
| 2000/01 | Gurið Mortensen | VB | Tjaldur-VB |
| 1999/00 | John Petersen | StÍF | VÍF-StÍF |

# Jákup Hjaltalin í essinum

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Sp EKD6
Hj K76
Ru EK2
Kl B75

Sp B1043 Sp 97
Hj E54 Hj DB932
Ru 43 Ru B95
Kl D1032 Kl 64

Sp 82
Hj 108
Ru D10862
Kl EK98

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| 2nt | Pas | 4nt | p |
| 6nt | a.p. | | |

2nt = 20-21 hp
4nt = Spyr um 2nt hondin hevur nakað eykað.

Jákup Hjaltalin, ið var norðan, meldaði í so hart, tá ið hann meldaði 6nt við 20 hp og 4333 fordeiling. Men meldar ein hart, skal ein eisini spæla væl og tað gjørdi Jákup. Heðin Mouritsen, ið sæt eystan, spældi hjartar damu út, Jóannes Mouritsen, sum sæt vestur, gjørdi ein feil, tá ið hann tók við essinum og spældi hjartara aftur. Jákup tók við konginum og tók fýra rútarstingir og kom til hesa støðuna:

Sp EKD6
Hj
Ru
Kl B75

Sp B1043 Sp 97
Hj Hj DB9
Ru Ru
Kl D103 Kl 64

Sp 82
Hj
Ru 2
Kl EK98

Til rú 2 fekk Jóannes ein óloysiligan trupulleika. Hann kundi ikki kasta ein kleyvara, tí so vann Jákup við at taka kleyvar ess og kong, Jóannes kundi heldur ikki kasta spar, tí so varð tann síðsti spaðarin hjá Jákup góður. Altso 12 stikk uppá skvis

Jóannes kann forða fyri, at Jákup fær tempo til skvisina, við ikki at taka fyri hjartar ess í fyrsta stykkið. Men so vinnur Jákup lætt við, uppá sama hátt, at taka fyri sínar rútar-ar. Jóannes kann nú kasta hjartar ess burtur og framvegis varveita haldið í báðum teimum svørtu litinum. Men tá tekur Jákup fyri spar ess, kong, damu og spælir Jóannes inn uppá tann síðsta sparin. Jóannes má nú spæla út frá kleyvar damu. Altso 12 stikk uppá sluttspæl.

# PRO/AM kapping í bridge

**Óroyndir leikarar við royndum makkarum. Tað var uppskriftin, tá seinast frálærukvøldið í Bridge var á skránni mánakvøldið**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Mánakvøldið var síðsta kvøld hjá teimum, ið ganga til frálæru í bridge í 2004. Fyri at gera nakað serligt burturúr, varð skipað fyri kapping, har ein næmingur spældi saman við einum royndum bridgespælara. 12 pør luttóku í kappingini, ið varð skipað sum ein mitchell kapping, har norður og suður sita fast. 12 spøl vóru leikt.

Kappingin gekk framúr væl, næmingarnir dugdu væl at spæla og kláraðu eisini at halda tíðuna.

Kappingin hjá N/S gjørdist ikki serliga spennandi. Carl og Jenny vóru framúr góð og gjørdist eisini klárt nummar eitt. Á øðrum plássið komu Jórun og Carl, ið eisini høvdu eina góða skoru. Jórun og Carl ganga bæði til bridge frálæru, so sigast kann ikki annað enn, at eitt 2. pláss millum fleiri so góðar spælarar er sera flott.

Hjá E/V varð kappingin sjáldsama spennandi, einans 3 stig vóru millum nr. 1 og 6. Tá ið avtornaði, gjørdist Majbritt og Bogi fremst við 62 stigum, meðan Knút og Birita gjørdist nummar tvey.

Kvøldskúlin byrjar aftur mánakvøldi 10. januar 2005.

**N/S**

| | par | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Jenny - Carl | 86 |
| 2 | Carl - Jórun | 71 |
| 3 | Pætur - Lovisa | 57 |
| 4 | Birgir - Jan | 54 |
| 5 | Arnbjørn - Gudmund | 46 |
| 6 | Kurt - Flemming | 46 |

**E/V**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Maibritt - Bogi | 62 |
| 2 | Knút - Birita | 61 |
| 3 | Marjun - Nicolai | 60 |
| 4 | Andrass - Heðin | 59 |
| 5 | Levy - Danny | 59 |
| 6 | Heini - Jana | 59 |